# Asfalt ella føroyskt mál?

**- Um ein politikari hevur eina millión, skal hann so keypa asfalt ella føroyskt mál? Hugsa tær hvussu nógv føroyskt mál og hvussu lítið asfalt hann hevði fingið fyri pengarnar, sigur Jonhard Mikkelsen, og minnir á, at umstøðurnar at læra seg føroyska málið er og verður ein spurningur um politiska raðfesting**

MÁL
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Nú enn eitt skeið í føroyskari stavseting var liðugt í vikuni, er Johnard Mikkelsen, stigtakari og lærari, ikki í iva. Motivatiónin hjá fólki at læra seg at stava føroyskt økist í takt við tørvin á at duga okkara mál væl. Og tørvurin hevur neyvan verið størri, nú ein alsamt størri partur av samskiftinum bæði í vinnulívinum og privat fer fram skrivliga.

### Mangla føroyskar málmyndir

- Tað sosatt ikki motivatiónini ella viljanum hjá fólki, tað er galið við. Trupulleikin er heldur, at føroyska málið er ikki er ein natúrligur partur av tí, sum vanlig fólk eru engasjerað í dagliga. Tað eru ikki føroyskar málmyndir, tú sært og setir í samband við tað stuttliga og spennandi í gerandisdegnum, sigur Johard Mikkelsen.

Hann minnir á, at alt, líka frá fartelefonum og telduspølum til filmar og tíðarrit fyri tað allarmesta er á útlendskum máli, og tí verður føroyskt áhaldandi otað út í ein lítlan bás, har tað í besta føri bara er avmarkað til eina lærugrein skúlanum.

- Og tað skaðar føroyska málið, tí okkara mál mennast bara, um tað sleppur at súgva merg úr tí, sum fólk ganga upp í og eru upptikin av. So leingi tey impulsini í høvuðsheitum koma úr útlendskum, ja so verður menningin av føroyskum við skerdan lut.

Johard Mikkelsen viðgongur, at hetta er hansara egna teori um, hví so nógvir føroyingar hava trupulleikar við at stava føroyskt.

- Vit raðfesta heldur ikki gransking í orsøkini til trupulleikarnar, so eg má bara gita meg til, hvør orsøkin er, minnir hann á.

- Ein onnur orsøk er uttan iva, at fólk halda at man ikki kann læra føroyska mállæru uttan at vera tristur og í ringum lag samstundis. Tað er soleiðis, alt ov nóg minnast føroyskt í skúlanum. Har kundu vit lært nógv av bretum, sum duga fantastiska væl at brúka humor sum brellbita, tá teir borðreiða við mállæru, sigur Jonhard Mikklesen, og leggur afturat

- Í síðsta enda er hetta ein spurningur um politiska raðfesting. Tá asfalt og betong er á breddanum, síggja vit, at pengarnir eru til. So er spurningurin bara: Um ein politikari hevur eina millión, skal hann so keypa asfalt ella føroyskar tekstir til filmar fyri hana? Hugsa tær hvussu nógv meira føroyskan tekst og hvussu lítið asfalt hann hevði fingið fyri pengarnar, sigur Jonhard Mikklesen.

Sum støðan er í løtuni er tað soleiðis, at tú skalt berjast fyri hvørji 10 krónu til málið. Men hetta er ein uppgevandi hugburður sum bara góðtekur støðuna sum hon er, heldur enn at vísa veruligan vilja broyta hana, staðfestir hann.

Men eisini hetta er ein spurningur um raðfesting. At velja onki at gera og lata standa til er eisini ein politisk avgerð í síðsta enda, minnir Jonhard Mikkelsen á.

Sjálvur hevur hann tó ongar ætlanir um at gevast á hondum. Í næstum verður skeiðið í føroyskari stavseting tikið uppaftur. Hartil arbeiðir Jonhard Mikkelsen við eini ætlan um at leggja skeiðið í út á netið, so fólk kunnu royna seg sjálvi, og tey sum longu hava verið á skeiði, kunnu halda tað við líka.


– Yes, babe – hon blotnaði eisini tá ið eg segði „babe“. Eg hevði snarað fastur um lítlafingur síðan eg var smádrongur. Hon hevði longst eftir tiltaluni „babe“ alt livi til fánýtis – at eg segði tað nam við onkrar serligar hjartastrongir.
Hon skonkti og so pakkaði hon upp. „Hilmar! Hilmar! my hero – hevur tú keypt mær hesa?“
– Yes, babe.
Hon drønaði in í kamari og kom út aftur sum fullrigga. Sum klipt úr Kvinnu.
Blusin sat sum stoypt á hesum lítla skropnaði kroppinum. Hevði hon brúkt push-up og rætt ryggin eitt vet hevði hon sæð út sum ein 18 ára gomul.
18 ár heilt upp til har húðin kom undan hálsinum. Tá var hon ikki 18 meira. Longur upp tú komst longur komst tí burtur frá 18. Hon snerktist upp longur upp tú komst. Og so hevði hon brillur við dubultum glosum so hon gánaði og snerkti hvørja ferð hon hugdi upp. Tað gjørdi alt eyvita nógv verrið.
Men men innan fyr rukkurnar og lyvraplettarnar var fastur yngri enn nógvar yngri eg kendi. Bannið uppá at sinnalagi og blusin matsjaðu. Tað var bara henda vælsignaða húðin sum gjørdi at ikki sást longur inn. Tað sást ikki inná botn, og tað var spell. Hon var so ung í tí at hon hevði garantera gingi í g-strongi hevði hon ikki ræðst so illa mostir.

**Rættaður tekstur**
**Í gjár bóðu vit lesarar finna feilirnar í einum tekstbroti, sum vit prentaðu í blaðnum. Nú ber til at kanna eftir, tí niðanfyri hava vit fingið Jonhard Mikkelsen at rætta tekstin fyri okkum**



*34 ára gamli Tróndur Bogason Hansen, tónaskald, fær nú fíggjarliga umstøður at savna seg um tónleikin næstu trý árini*

# Tónaskald fær arbeiðsnáðir

**Tróndur Bogason Hansen, tónaskald, fær nú fasta mánaðarløn úr Mentanargrunninum í trý ár, so hann kann savna seg um sítt arbeiði við tónleiki**

MENTAN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

34 ára gamla tónaskaldið Tróndur Bogason Hansen fær nú umstøður at arbeiða í friði og náðum við sínum tónleikaverkætlanum. Tað gjørdist nevniliga hann, sum í gjár streyk av avstað við størstu starvsløníni, sum Mentanargrunnur Landsins letur, ið gevur umsøkjaranum fíggjarligt rásarúm at arbeiða við síni list burturav í trý ár.

Tróndur Bogason Hansen byrjaði at lesa tónleik á universitetinum í Keypmannahavn. Í 1999 skifti hann til Kongaliga Danska Musikkonservatoriið, har hann gekk í einum serligum komponistaflokki og gjørdist kandidatur í komposition í 2005. Í fjør summar tók Tróndur Bogason Hansen endaligt prógv sum tónaskald á Kongaliga Danska Musikkkonservatoriinum.

### Umsóknir fyri 35 milliónir

Umfram trý ára starvslønina til Trónd Bogason Hansen vórðu størru starvslønirnar til listarligt og mentanarligt arbeiði latnar soleiðis í ár:

Eyð Matras, sjónleikari, 1 ár,
Marianna Mørkøre, listakvinna, 6 mánaðir,
Rannvá Káradóttir, listakvinna, 6 mánaðir.

Harumframt eru starvslønir latnar til 38 umsøkjarar.

Tilsamans 137 mánaðarlønir fyri góðar 3,4 milliónir eru latnar til týðingar og listaligt og mentanarligt arbeiði.

Tilsamans vóru 93 umsøkjarar, ið søktu um starvsløn fyri góðar 35 milliónir krónur. Av teimum vóru 42 umsóknir játtaðar.

Íverksetanarstudningur varð latin 3 umsøkjarum – kr. 225.000 tilsamans. Umsøkjararnir vóru 11 í tali.

Hesi fingu starvsløn í 2010:

| | |
|---|---|
| Agnar Artúvertin | 1 mánað |
| Andrias Justesen | 1 mánað |
| Arnbjørn Ó. Dalsgarð | 2 mánaðir |
| Astri Luihn | 2 mánaðir |
| Barbara Christophersen | 1 mánað |
| Bárður Persson | 1 mánað |
| Dánjal á Neystabø | 3 mánaðir |
| Eli Smith | 3 mánaðir |
| Elin Henriksen | 2 mánaðir |
| Eyð Matras | 1 ár |
| Guðrið Hansdóttir | 2 mánaðir |
| Gunnvá Zachariasen | 1 mánað |
| Hanni Julius Bjartalíð | 3 mánaðir |
| Hans E. Andreasen | 3 mánaðir |
| Hans P. í Brekkunum | 1 mánað |
| Heðin Ziska Davidsen | 1 mánað |
| Helle T. Johansen | 2 mánaðir |
| Høgni Lisberg | 2 mánaðir |
| Janus á Húsagarði | 2 mánaðir |
| Jógvan S. Biskopstø | 2 mánaðir |
| Johnny Thomsen | 2 mánaðir |
| Jóna Kristin Thomsen | 2 mánaðir |
| Kári Bæk | 3 mánaðir |
| Katrina í Geil | 3 mánaðir |
| Kinna Poulsen | 1 mánað |
| Knút Olsen | 2 mánaðir |
| Marianna Mørkøre | 6 mánaðir |
| Martin Joensen | 3 mánaðir |
| Meinhard Jensen | 2 mánaðir |
| Michael Paul Reveal | 2 mánaðir |
| Niclas Johannesen | 3 mánaðir |
| Olav Schneider | 2 mánaðir |
| Páll Holm Johannesen | 2 mánaðir |
| Rannvá Káradóttir | 6 mánaðir |
| Sakaris Fríði Stórá | 1 mánað |
| Sigrun Gunnarsdóttir | 2 mánaðir |
| Súsan í Jákupsstovu | 2 mánaðir |
| Súsanna Tórgarð | 1 mánað |
| Thomas A.U. Andersen | 2 mánaðir |
| Tóroddur Poulsen | 4 mánaðir |
| Tróndur B. Hansen | 3 ár |
| Uni Leitistein Hansen | 3 mánaðir |

Mentanargrunnur Landsins